# Posta Stamps

Føroyar Nr. **58**

Mai 2024



Posta
FAROE ISLANDS

**Fríðrikur 10. kongur**

**Tær fýra árstíðirnar**

**HAFNIA 24**

Trónuskifti

# Fríðrikur 10. kongur




Í siðbundnu nýggjársrøðuni tann 31. desembur 2023 boðaði 83 ára gamla drotningin, Hennara Kongaliga Hátign Margreta drotning 2. frá, at hon fór at siga drotningaheitið frá sær og lata trónuna til elsta sonin, krúnprinsin Fríðrik.

Sjálvt trónuskiftið var, sambært danskari siðvenju, einfalt og snúði seg um at Margreta drotning tann 14. januar 2024, júst 52 ár eftir at hon sjálv tók við heitinum, skrivaði undir eitt fráfaringarskjal. Við undirskriftini fall trónan til krúnprinsin – og ein tíma seinni útrópti Mette Frederiksen, forsætismálaráðharri, Fríðrik 10. sum kong frá svalanum á danska tinghúsinum, Christiansborg.

Við hesum fingu londini í danska ríkisfelagsskapinum, Danmark, Grønland og Føroyar, nýggjan ríkisstjóra – Fríðrikur kongur 10. - hvørs leiðarorð eru: *"Sameind, trúbundin, fyri Kongsríkið Danmark."*

## Konstitutionelt monarki

Danska ríkið er eitt konstitutionelt monarki. Tað vil siga, at luturin hjá konginum er at vera forseti uttan politiskt vald. Allar politiskar avgerðir liggja hjá fólkavaldum politikarum, danska forsætismálaráðharranum, føroyska løgmanninum og grønlendska landsstýrisformanninum. Starvið hjá konginum er at umboða ríkið, tey fólkavaldu arbeiða fyri. Hetta fer fram á einum ráðharrafundi ið verður hildin einaferð um vikuna, har kongur situr í forsæti. Har kunnar forsætismálaráðharrin um støðuna í ríkinum og arbeiðið hjá stjórnini – og kongur skrivar saman við ábyrgdarligum ministarum undir nýggjar lógir. Eftir eitt fólkatingsval velur kongurin tann danska floksformann, ið meirilutin av politisku flokkunum peika á, at standa fyri stjórnarsamráðingum – og at skipa stjórn.

**Fríðrikur 10. kongur**
Mynd: Steen Evald
Snið: Ella Clausen

# Nýggi kongurin

Fríðrikur kongur 10. varð føddur tann 26. mai 1968, sonur Margretu drotning 2. og hjúnarfelaga hennara Heindrik prins (Henri de Laborde de Monepezat).

Tá hann hevði tikið studentsprógv, byrjaði Fríðrikur sína hernaðarskyldu hjá Kongaligu Lívgarduni. Hann hevur m.a. tænt í herinum, flogvápninum og sjóverjuni – og er yvirmaður í øllum trimum vápnagreinunum. Frá 1989 til 95 las hann stjórnmálafrøði á Aarhus Universitet og Harvard University. Hann hevur havt tilknýti til donsku umboðsstovuna á ST høvuðsstøðini í New York og starvast sum skrivari á donsku sendistovuni í París.

Undir Olympisku leikunum í Sydney í 2000 hitti Fríðrikur prinsur australsku Mary Donaldson. Unga parið trúlovaðist í 2003 og giftist árið eftir. Í 2005 fingu tey fyrsta sonin, Christian. Í 2007 fingu Fríðrikur og Mary dóttrina Isabellu og í 2011 tvíburðarnar Vincent og Josephinu.

Fríðrikur kongur er virkin ítróttarmaður og hevur við árunum gjørt vart við seg innan siglingarítrótt, renning og súkkling. Millum annað er hann fyrsti kongaligi persónur, ið hevur fullgjørt ein "Ironman" undir einari kapping í 2013.

Áhugin fyri ítrótti førdi við sær, at Fríðrikur, sum tá var krúnprinsur, gjørdist limur í Altjóða Olympiska Ráðnum í 2009 og varð afturvaldur í 2018.

Nýggi danski kongurin er kendur fyri sína óhátíðarligu framferð og fryntliga atburð - og væntandi er at trónuskiftið fer at føra til endurnýggjan og nútímansgerð av kongshúsinum og siðbundnum karmum og virksemi. Ein nútímans familja í tráð við tíðina og samfelagið, hon umboðar.

Vit ynskja Fríðriki kongi 10. til lukku við trónutøkuni – og vóna at hansara tíð sum forseti í ríkisfelagsskapinum verður merkt av friði og framburði.

*Posta*
*Tekstur: Anker Eli Petersen*



## Heiðrik á Heygum

# Tær fýra árstíðirnar




Fyri ári síðan gav Posta, sum fyrsta norðurlendska postverk út kryptofrímerki. Myndevnið var árstíðirnar, sum Heiðrik á Heygum sniðgav so hegnisliga. Og nú, júst eitt ár seinni, verða vøkru tekningarnar givnar út sum vanlig frímerki, tó hesa ferð settar saman í einum smáarki við vøkrum blómukantum.

*Um íblásturin til útgávuna sigur Heiðrik á Heygum soleiðis:*

Posta læt mær eina sera spennandi uppgávu upp í hendur. Eg varð biðin um at sniðgeva frímerki, sum myndaðu tær fýra árstíðirnar í Føroyum. Spentur upp á at fagna okkara serstaka mentanarliga samleika, fekk eg íblástur úr vøkru broderaðu blómunum í føroysku klæðunum. Við at seta blómur og djór, alt eftir árstíðini, inn í sniðini, royndi eg at skapa frímerki, sum myndaðu tær veruligu Føroyar.

Eg valdi við vilja svarta bakgrund við tilvísing til siðbundnu føroysku klæðini, sum ofta eru svørt við vøkrum broderaðum blómum. Henda avgerð fagnar ikki einans okkara mentanararvi, men dregur eisini fram vøkru blómulitirnar og skapar harvið eina visuelt eyðsýnda samanseting, sum ger tann siðbundna føroyska estetikkin ítøkiligan.

Hvør árstíð er eyðkend av hjáveruni hjá serstøkum djórum, sum geva íkast til ímyndina. Várið bjóðar nýlembdu lombunum vælkomnum og fagnar tjaldrinum, tjóðfuglinum, sum nú er komin heimaftur. Summarið fagnar lundanum og súluni, sum nú síggjast fram við landi. Um heystið verður seyðurin flettur, og vit fara eftir havhesti. Til seinast er tað veturin, tá ið haran aftur skiftir lit, og feldurin gerst hvítur, og gæsnar verða slaktaðar til jóla. Hesi árstíðarinnar frábrigdi geva dýpd og fyllu til søguna, sum verður søgd við frímerkjunum, og vísa okkum soleiðis á tað djúpa sambandið millum natúrligu rútmuna og siðvenjurnar í landi okkara."

**Tær fýra árstíðirnar**
Listafólk: Heiðrik á Heygum




**Sólsetur av Sornfelli**
Mynd: Andrija Ilic

Reyði Krossur

# Samarittarnir 25 ár







**Samarittarnir hjá Reyða Krossi - 25 ár**
Snið: Kári við Rættará

Vit síggja tey javnan – fólkini í reyðu búnunum við eyðkendu smáu ryggsekkjunum og Reyða Kross-merkinum á bringuni.

Tey eru sjónliga til staðar á stórum konsertum, festivalum, ítróttatiltøkum, stevnum og sum heild, tá ið nógv fólk savnast kring landið.

Tey eru samarittarnir hjá Reyða Krossi - menniskju við ymiskum royndum, frá ymiskum samfelagsbólkum og á ymiskum starvs- og útbúgvingarstigum. Fólk, sum sjálvboðin og ólønt brúka stóran part av síni frítíð at ansa eftir okkum.

Um vit koma skeivt fyri, reinsa tey sárini, binda um ella seta plástur á - og um tað ringasta skuldi hent, taka tey hjartastartaran úr ryggsekkinum og bjarga tínum lívi.

Tey hjálpa til, um onkur er ovdrukkin – bjóða ból, so fólk kunnu sova rúsin av sær – og senda fólk víðari til lækna ella skaðastovu, um tørvur er á tí.

Tey spyrja ikki hvør, hvat ella hví. Tey eru samarittar og eins og tann miskunnsami sámáriubúgvin, veita tey uttanveltaða hjálp til ein og hvønn, sum hevur brúk fyri tí.

Samarittbólkurin hjá Reyða Krossi var settur á stovn í 1999. Tey síðstu 25 árini hava samarittarnir ment seg, og eru nú ein væl skipað, sjálvboðin heilsutilbúgving. Fyri at gerast partur av toyminum skalt tú undir eina 30 tíma samarittútbúgving, sum m.a. hevur eitt víðkað fyrstuhjálparskeið við sær. Tað verður regluliga skipað fyri venjingum og útbúgvingum í fysiskari og sálarligari fyrstuhjálp – so samarittarnir eru væl fyrireikaðir, bæði tá ið talan er um smásnuddir ella álvarsaman skaða – og toymið er til reiðar, skuldi størri ólukka komið fyri.

Seinastu árini er størri ansur givin neyðugum tilbúgvingarætlanum í Føroyum, skuldu altjóða kreppur fingið avleiðingar her heima.

Reyði Krossur kannar møguligar hóttanir og ger ætlanir um, hvussu tær skulu handfarast – og eingin ivi er um, at samarittarnar eru við í ætlanunum.

Jú, tey í reyðum halda eyga við – og ansa eftir okkum. Men vit geva eisini teimum ans og eru takksom fyri teirra stóru tøk í hjálpararbeiðinum.

Til lukku við 25 árunum – vit eru errin av tykkum!

*Posta*
*Tekstur: Anker Eli Petersen*



**Samarittarnir til arbeiðis**
Mynd: Ólavur Frederiksen

# Altjóða framsýning:
# HAFNIA 24




Í ár eru 400 ár síðan at Christian 4. kongur innførdi skipaðan postflutning í danska ríkinum – og harvið legði grundarsteinin til danska postverkið. Tað hátíðarhalda vit við hesari HAFNIA útgávuni – tað er hóast alt, eisini ein partur av søguni hjá Posta.

## Danska postverkið

Fyrsta politiska útspælið um skipaðan postflutning í Danmark, finst í "*Verdslige Lov*" frá 1522 hjá Christiani 2. Men hugskotið varð ikki framt í verki. Ikki fyrr enn heila øld seinni, við boðbrævinum "*Forordning om Post-Budde*" hjá Christiani 4. í 1624, varð ein verulig og virkandi almen skipan sett í verk til postflutning í Danmark.

Níggju postrutur vórðu skipaðar. Á mest týðandi rutuni – Keypmannahavn – Hamburg – har fremsta handilssambandið fanst, vórðu brøv, pakkar og farmur flutt við hestavogni. Hinar 8 innanríkisruturnar vóru gongurutur, har postboðini bara bóru brøv við sær. Hetta varð upprunin til danska postverkið og høvuðspostskrivstovan lá í Børsen í Keypmannahavn, sum brann í grund herfyri.

## Postur til Føroyar

Føroyar vóru ikki partur av virkseminum hjá fyrsta danska postverkinum. Postflutningurin til oyggjarnar kom við farmaskipum, ið fluttu vørur til Kongaliga einahandilin – og tá hesin varð niðurlagdur í 1856, tóku ymsir aðrir aktørar yvir. Tað snúði seg ikki um tær stóru postmongdirnar – brøv frá myndugleikunum í Keypmannahavn til embætisverkið í Føroyum, handilsbrøv og onkur persónlig brøv til serliga danskar prestar og embætisfólk. Posturin varð sendur til amtmannin, sum syrgdi fyri útbering á oyggjunum, m.a. við sokallaðu skjútsskipanini, sum álegði monnum í ymsum bygdum at flyta fólk, frakt og post við báti til aðrar oyggjar, ella til gongu yvir fjøll.

## Postdamparin Diana

Í 1870 yvirtók danska postverkið guvuskipaferðsluna til Føroyar og Ísland, umvegis Lerwich í Hetlandi ella Leith í Skotlandi. Tað var postdamparin *Diana*, sum røkti leiðina frá 1. mars til endan av novembur – sjey túrar aftur og fram. Diana sigldi nøkur ár, til leiðin varð yvirtikin av "*Det Forenede Dampskibs Selskab*" (DFDS).

## Fyrsta postavgreiðslan

Í 1869, tá Diana skuldi byrja føroysk-íslendsku postleiðina, setti danska postverkið navnframa sýslumannin H. C. Müller í starv sum føroyskan postavgreiðslumann – og í 1870 stovnaði hann fyrstu føroysku postavgreiðsluna í heimi sínum í Havn. Tað varð nú møguligt hjá einhvørjum at senda ella móttaka brøv, pakkar og blød til fastan portokostnað.

Við ábótini til postlóggávuna í 1871, vórðu tríggjar føroyskar postleiðir gjørdar í 1872 og tríggir postberar settir í starv.

## Postdamparin Smiril

Í 1895 lat privata handilsfyritøkan A/S J. Mortensens Eftf. á Tvøroyri, eitt lítið guvufarmaskip byggja á *Kochums Mekaniska Verkstad* í Malmø. Stórur tørvur var á regluligum farma-, ferðafólka- og postflutningi millum oyggjarnar, nú umleggingin frá miðaldarligum bóndasamfelag og nútímans fiskivinnutjóð av álvara hevði sett ferð á samfelagsmenningina.

Tiltrúgvin til at politiska yvirvaldið megnaði at loysa logistiskar tvørleikar og byggja ein virkandi infrastruktur, var ikki til staðar. Serliga á Tvøroyri, har reiðaravirksemi og fiskivinna blómaði, var ónøgdin stór. Tað endaði tí við at A/S J. Mortensens Eftf. rætt og slætt bygdi sín egna farma- ferðafólka- og postdampara, "Smiril," og settu hann í strandfarasigling í januar 1896.

Umstøðurnar fyri strandfarasigling vóru truplar í Føroyum um tað mundið. Smiril skuldi røkja flestu bygdir í landinum, men kundi bara leggja at í nøkrum fáum plássum. Tað var tí neyðugt at brúka ferjubátar at flyta ferðafólk og farm millum skip og land tey flestu støðini – og tað gjørdi strandferðsluna tvørliga og seinføra.

Men strandferðslan var tó ein ógvuslig broyting til tað betra – serliga í posthøpi. Smiril hevði enntá sína egnu postavgreislu umborð har brøv og pakkar vórðu sorterað og stemplað – til mikla gleði og frægd fyri frímerkjasavnarar í eftirtíð.

Umfatandi siglingin hjá Smirli steðgaði nøkur ár seinni. Menningin gekk víðari, nýggj vinnuáhugamál stungu seg upp. Í 1917 varð skipið yvirtikið av tí almenna og gjørdist upphavið til Strandfaraskip Landsins.

Og við tí sleppa vit postalu slóðbrótarasøguna úr Føroyum. Føroyska postsøgan hevur mong áhugaverd leiti, men tey goyma vit til eina aðra ferð.

Vit ynskja Postnord til lukku við 400 ára degnum – og ynskja tykkum mong og góð ár framyvir.

*Posta*

*Tekstur: Anker Eli Petersen*




**HAFNIA 24**
Listafólk / gravura:
Martin Mörck

Sasho Bjartsson:

# Julius í Likkudali







**Julius í Likkudali**
Snið: Allan Davidsen

Jólatíðin er serlig. Tað kunnu vit øll, smá sum stór, verða samd um.

Hon tekur okkum við øllum sansum, tá ið vit merkja kavaflykrurnar leggja seg á kjálkarnar, smakka heita kakaoið á tunguni, angan av kleynunum, sum kóka í grýtuni og hoyra jólatónleik. Hetta er tíðin, tá ið vit kenna á okkum, at vit fevna enn meira um hvønn annan. Men hví?

Tá ið tú vart lítil, royndu tey vaksnu at skapa jólagleði rundan um teg. Tú minnist, tá ið foreldur tíni søgdu: "Skjótt kemur jólamaðurin!". Og tú fekst stór eygu, og kenslan í búkinum var góð, tí tú fórt at hugsa um dreymagávuna, sum tú ynskti tær frá jólamanninum. Men skjótt gjørdist tú eldri og jólaheimurin øðrvísi, tí nú veitst tú, at jólamaðurin bara er eitt ævintýr. Men er hann bara tað?

Jólamaðurin, Julius, er fyri mær meira enn bert eitt ævintýr. Og tað fer hann at vera frameftir, nú barnafamiljurnar hava tikið hann til sín, sum jólamannin í Føroyum. Men, hvussu bleiv Julius til?

Vit spola tíðina aftur til 2016, tá ið eg stóð á Vaglinum og bíðaði eftir at stóra jólatræið skuldi tendra. Spentar barnafamiljur í hópatali komu saman fyri at síggja løtuna.

Veðrið var við okkum – stilt og turt. Býurin var jólaprýddur, í smáu hugnaligu smáttunum seldu tey heimabakaðar vaflur, og stóri brandbilurin var klárur at lyfta jólamannin til jólastjørnuna ovast á trænum. Alt var klárt ta løtuna, sum børnini høvdu glett seg mest til.

So byrjaði prestur at tala um høgtíðina og borgarstjórin við. Børnini og eg ótolnaðust eftir jólamanninum. Meg minnist, at eg var serliga spentur at vita, hvør jólamaðurin í ár var, og hvussu hann fór at megna uppgávuna. So hoyrdi eg orðini: "Latið okkum fara at rópa eftir jólamanninum!". Børnini róptu

harðari og harðari, og brádliga hoyrdist eyðkenda gamla floytan, sum á hvørjum árið kemur ýlandi eftir Áarvegnum. Eg eygleiddi hendan sjónleikin og vónaði at leikur fór fram, sum eg hevði hugsað. Stórt og vilt.

Jólamaðurin steig av brandbilinum og børnini róptu: “Hey jólamaðurin!”. Hetta var fyrstu ferð, eg hugsaði, hví tey ikki rópa eftir jólamanninum við navni. Tá fór hugflogið í gongd. Kanska hevði eg tímað hesa uppgávu – at leikt ein jólamann, sum øll børn í Føroyum kenna við navni.

Tá ið jólatræið varð tendrað, segði eg við fyriskiparan, sum stóð við mína lið, at næsta ár vil eg fegin royna hesa uppgávu. Aftursvarið var greitt: “Tað skalt tú sleppa!”.

Tíðliga árið eftir fór eg saman við einum vinmanni, Rógva Brekku Dam, sum leingi hevur verið á undirhaldspallinum, til verka at skapa ein jólamann, sum allar barnafamiljur skuldu kenna. Uppgávan varð tikin seriøst. Báðir líka spentir og ótolnir. Eftir nógvar drekkamunnar komu vit fram til, at búnin hjá jólamanninum skuldi hava íblástur frá føroyska stílinum, hann skuldi vera lívligur, klossutur, argaligur við einum skálkasmíli, og hann skuldi eita Julius.

Vit høvdu somuleiðis nógvar dreymar og settu okkum høg mál. Dreymarnir vóru at undirhalda um allar Føroyar, gera føroyskt barnatilfar í sjónvarpinum, skriva nýggjar jólasangir, gera sangleik, hava egna heimasíðu og størsta ynskið var at fáa børnini at siga: “Hey Julius!”.

Talið sjey er eitt eyðkennistal í ævintýrum. Aftaná sjey ár rukku vit okkara málum, og so var bara eitt at gera, og tað var at seta nýggj og enn størri mál.

Millum nýggju dreymar og hugskot okkara er eitt nú at framleiða meira føroyskt barnatilfar til sosialu miðlarnar, sjónvarpið, sjónleikapallin og at fáa allar barnafamiljur at senda sítt jólaynski við Julius-frímerki á brævbjálvanum umvegis góða gamla postkassan.



**Julius bjóðar karamellur á Vaglinum**
Mynd: Jens Kr. Vang

100 ár í Føroyum:

# Frelsunarherurin




Frelsunarherurin byrjaði sítt virksemi í Føroyum tann 23. oktobur 1924. Nú 100 ár seinni ljómar enn songur, horntónleikur og gleðiboðskapurin: *Framá Kristi stríðsmenn, framá hvør, ið kann.*

## Frelsunarherurin

Frelsunarherurin er ein altjóða evangelisk rørsla, har boðskapurin byggir á Bíbliuna og tænastan fær íblástur av kærleika til Gud. Frelsunarherurin - The Salvation Army - sá dagsins ljós í London í 1865, men skjótt spreiddi rørslan seg kring allan heimin og virkar í dag í 134 londum.

Sereyðkenni fyri Frelsunarherin eru fólkini í herbúnum, horntónleikur, tann glaði sangurin og lívgevandi boðskapurin. Og úr samkomuarbeiðinum sprettir hjálpararbeiði, tí kristniboðanin og sosiala arbeiðið eru tvær síður av somu søk – og óloysiliga knýtt saman. Hetta sæst aftur í møtinum við einstaka menniskja. Lívið er ein gáva frá Gudi og friðhalgað honum, sum skapti okkum, og øll menniskju hava eins virði. Hetta ger, at Frelsunarherurin vil strekkja seg langt fyri at hjálpa. Sosiala arbeiðið er tillagað tørvin í nærumhvørvinum, alt frá sjúkrahúsum, skúlum, barnagørðum, arbeiði millum børn og ung, neyðhjálpararbeiði og arbeiði millum heimleys.

## Virksemi í Føroyum

Samkomuvirksemið byrjaði í Tórshavn í 1924, og heldur Frelsunarherurin enn til í somu hølum mitt í Tórshavn. Flestu føroyingar munnu hava sæð Frelsunarherin í skrúðgongu ella til útifund á Vaglinum um ólavsøkuna. Við fløggum og horntónleiki fer skrúðgongan oman móti Vaglinum at halda útifund. Vanliga eru fýra útimøti á ólavsøku, og øll hesi 100 árini hevur Frelsunarherurin verið partur av tjóðarhátíðini. Vælkendi miðnáttarsangurin hevur sín uppruna í fjøldini, ið syngur felagssang saman við Frelsunarherinum. Beint fyri miðnátt, undir leiðslu

**Frelsunarherurin 100 ár í Føroyum**
Listafólk: Edward Fuglø

av hornorkestrinum, ljómar sálmurin "*Tíðin rennur sum streymur í á*" og síðan "*Tú alfagra land mítt*", áðrenn tað verður stilt, og fólkið biður Harrans bøn.

Frelsunarherurin hevur eisini ein samkomubygning í Vági, har virksemið byrjaði 9. november 1947.

Eisini í Føroyum veitir Frelsunarherurin sosiala hjálp. Her er ein útrætt hond, telefonin verður svarað og fólk fáa hjálp - soleiðis hevur skipanin virkað í 100 ár. Seinnu árini hevur Frelsunarherurin savnað inn pening og varpað ljós á fátækradømi undir heitinum "*Hjálpið okkum at hjálpa øðrum*". Jólahjálp verður veitt til uml. 200 familjur og fleiri eru, ið fáa hjálp ígjøgnum árið.

Eisini hevur Frelsunarherurin verið við til at varpa ljós á støðuna hjá heimleysum. Herberg Frelsunarhersins byrjaði 1. apríl 1988, og í dag fevnir arbeiðið um Herberg, hitastovu og búfelagsskap.

Samfelagið broytist, og av tí sama broytist sosiala arbeiðið hjá Frelsunarherinum. Í juni 2017 lat Frelsunarherurin upp ein viðgerðarstovn fyri ung, *Frælsi* á Eiði.

Frelsunarherurin vil vera røddin hjá teimum veiku í samfelagnum – teimum, ið ikki hava eina rødd ella ikki verða hoyrd:

*Finngerð Djurhuus Olsen,*
*Frelsunarherurin*

*"So leingi kvinnur gráta,*
*sum tær gera nú, vil eg stríðast.*
*So leingi børn ganga svong,*
*sum tey gera nú, vil eg stríðast.*
*So leingi fólk ganga inn og út úr fangahúsum,*
*sum tey gera nú, vil eg stríðast.*
*So leingi nakar er bundin av trældómi,*
*so leingi tað finst ein misnýtt kvinna,*
*so leingi tað finst ein sál,*
*sum livir uttan Guds ljós, vil eg stríðast.*
*Eg vil stríðast til tað síðsta - til endan."*

*- William Booth 1912*



Royndarprent

17. oktober 2024

# Árbók & ársmappa

Árbók, ársmappa og jólamerki verða send tykkum seinast í oktober saman við frímerkjaútgávuni, sum er tann 17. oktober.

## Árbókin 2024

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur, og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftan fyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Eins og seinastu árini er eitt ókeypis eintak av einum svartprenti í árbókini. Svartprentið verður givið út í sambandi við HAFNIA 24 útgávuna. Virðið á svartprentinum er 150 kr.

## Ársmappan 2024

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst?

So er hetta rætta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

## Jólamerkini 2024

Føroyska listakvinnan Helga Djurhuus hevur sniðgivið ársins jólamerki, sum mynda fitt jólaklipp. Helga býr og starvast í Danmark, har hon arbeiðir fulla tíð sum listakvinna. Hon er útbúgvin bachelor og kandidat innan visuelt design frá Det Kongelige Akademi í Keypmannahavn. Helga arbeiðir serliga við oljumálningum, men pappírsklipp og visuelt design hevur eisini hennara stóra áhuga.

Hetta er fyrstu ferð Helga teknar jólamerkini, og um íblásturin sigur hon soleiðis:

*"Eitt tað besta eg visti sum barn, var at klippa jólapynt saman við mínum kæru á jólum. Tað er jólahugni, har øll kunnu vera við, og tað ikki er dýrt. Serliga hesa tíðina við inflatión og øktum rentum, hugsaði eg at leggja dent á jólahugna, sum øll hava atgongd til. Tí havi eg valt at jólamerkini í ár skulu mynda jólaklipp, soleiðis at hvørt einkult jólamerki ímyndar eitt jólaklipp.*

*Eg vóni at inspirera fólk til at gera pappírsjólaklipp og njóta nærveruna saman við sínum kæru".*

Avlopið av søluni av jólamerkjaarkinum fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

15 jólamerki eru í arkinum, sum kostar 30,- kr.




**Árbók 2024** + 1 ókeypis svartprent
Prísur: 739,- kr




**Ársmappa 2024**
Pris: 719,- kr



**Heftimappa 2024**
Í mappuni eru tey trý sjálvklistrandi frí-merkjaheftini, sum eru givin út í ár. Myndevnini eru Sandoyartunnilin, Europa 2024 og Julius. Prísur: 504,- kr



**FDC mappa 2024**
Allir fyrstadagsbjálvar við røð og fyrsta-dagsbjálvar við smáarki, sum eru givnir út í ár, eru við í mappuni – í alt 14 bjálvar. Prísur: 796,- kr




**Jólamerki 2024 - Jólaklipp**
Listafólk: Helga Djurhuus.
Prísur: 30,- DKK








| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Fríðrikur 10. kongur** | **Tær fýra árstíðirnar** | **Samarittarnir 25 ár** |
| **Útgávudagur:** | 26.05.2024 | 24.06.2024 | 30.08.2024 |
| **Virði:** | 50,00 kr. | 4 x 23,00 kr. | 33,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 1020 | FO 1021-1024 | FO 1025 |
| **Stødd, frímerki:** | 30,6 x 38,0 mm | 30 x 40 mm | 40 x 30 mm |
| **Stødd, smáark:** | 130 x 70 mm | 80 x 100 mm | |
| **Myndir/ Listafólk:** | Steen Evald/Ella Clausen | Heiðrik á Heygum | Kári við Rættará |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Cartor Security Printers | Cartor Security Printers | Bpost, Belgia |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innskrivað bræv | Innanoyggja bræv, 0-100 g | Bræv til útheimin, 0-100 g |
| **Aðrar vørur:** | Mappa við smáørkum FO, DK, GL | Mappa við smáarki og NFT | |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.








| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **HAFNIA 24** | **Jólafrímerki: Julius í Likkudali** | **Frelsunarherurin 100 ár í Føroyum** |
| **Útgávudagur:** | 17.10.2024 | 17.10.2024 | 23.10.2024 |
| **Virði:** | 50,00 kr. | 23,00 og 33,00 kr. | 23,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 1026 | FO 1027-1028 | FO 1029 |
| **Stødd, frímerki:** | 60 x 30 mm | 40 x 30 mm | 40 x 60 m |
| **Stødd, smáark:** | 100 x 54 mm | | 100 x 70 mm |
| **Snið / listafólk:** | Martin Mörck | Allan Davidsen | Edward Fuglø |
| **Prentháttur:** | Gravura - stálprent | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | La Poste, Frankaríki | Cartor Security Printers | Bpost, Belgia |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innskrivað bræv | Bræv – innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. | Innanoyggja bræv, 0-100 g |
| **Aðrar vørur:** | Svartprent, mappa við smáarki og bjálva | Sjálvklistrandi hefti og 2 postkort | |

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. eina viku áðrenn útgávudagin**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Summar
**Listafólk:** Heiðrik á Heygum
**Prent:** Føroyaprent

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroelslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps

ISSN 1603-0036